GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/F
Tlf.: +298 591616 - Fax.: +298 591617

# Viðgerðarheimið Heilbrigdi
**176 Velbastaður**

**OG**

# Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi
**176 Velbastaður**

## Ársroknskapur 2017

Heiðavegur 31 - FO-600 Saltangará
post@gs.fo - www.gs.fo
Sp/f skrá nr. 3868

**INNIHALDSYVIRLIT** **Síða**

| | |
|---|---|
| Ársfrágreiðing | 1 |
| Átekning frá nevnd og fyristøðumanni | 5 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 6 |
| Rakstrarroknskapur (Viðgerðarheimið) | 7 |
| Rakstrarroknskapur (Sjálvsognarstovnurin) | 9 |
| Fíggjarstøða (Sjálvsognarstovnurin) | 9 |

# Ársfrágreiðing

Í oktobur 1986 góðkendi Føroya Landsstýri, at felagið Heilbrigdi setti á stovn viðgerðarstað fyri rúsdrekka – og rúsevnismisnýtarar. Viðgerðarheimið Heilbrigdi, ið er á Velbastað, fór undir sítt virksemi 01.dec.1986.

Hetta er soleiðis 32 ársfrágreiðing og roknskapur hjá viðgerðarheiminum.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, ið verður stýrdur av eini fimm- mannanevnd.

Í nevndini eru Rasmus Patursson, formaður, Kári Thorsteinsson næstformaður, Jacob Lindenskov, nevndarlimur, Michael Olsen, nevndarlimur og Jens Andreassen, nevndarlimur.

Hans Trúgvi Teirin, advokatur, er skrivari í nevndini.

Í viðtøkunum fyri heimið verður sagt, at "endamálið við viðgerðarheiminum Heilbrigdi á Velbastað er at vera viðgerðarstað fyri rúsevnismisnýtarar. Viðgjørt verður sambært teimum 12 stigunum hjá A.A. (alcoholics anonymos), eisini nevnd "Minnesota-viðgerðin".

Alkoholisma, addiction, bundinskapur er ein kronisk, økjandi og deyðilig sjúka sambært WHO.

Vit nevna sjúklingarnar undir einum felags navni "alkoholikarar". Í viðgerðini verður gjørt klárt, at ongin alkoholikari kann drekka við hógv, aftaná at ávís likamlig, sálarlig og sosial eyðkenni hava víst seg. Nógv orka verður eisini nýtt til at greiða frá, hvussu alkoholisman eisini rakar øll avvarandi.

Í fíggjarlógini fyri 2017 vórðu játtaðar kr. 5.960.000,- til viðgerðina.

Viðgerðin hevur umframt rúsevnisviðgerð eisini familjuviðgerð og evnisviðgerð eina ferð um mánaðin.

Vit hava í dag eina føroyska familjuviðgerð.

Familjuviðgerðin var støðga áleið eitt ½ ár, orsaka av sjúku hjá starvsfólki.

Vit høvdu fimm familjuskeið í 2016. Skeiðini vóru í tríggjar dagar hvørt.

Luttøkan til familjuskeiðini var í meðal 6. t.v.s. 90 viðgerðardagar.

Familjuviðgerðin er eydnast rættuliga væl, og ætlanin er at halda fram við hesi eftir summarfrítíðina í 2018. Hesi verða fyri tað mesta í Tórshavn, men koma eisini at verða aðra staðni í Føroyum.

Peningatørvurin til familjuskeiðini verður umleið 600.000,- kr. árliga komandi árini.

**Viðgerðarskráin fevnir um tríggjar høvuðspartar:**

1. Avrúsing og forviðgerð.
2. Viðgerðin, ið hevur til endamáls at læra rúsevnismisnýtaran at kenna seg sjálvan, og at læra hann at liva uttan rúsevni, ein dag í senn.
3. Eftirviðgerðin, ið hevur til endamáls at læra rúsevnismisnýtaran at luttaka á A.A. fundum og í andaligum felagskapum.

Fyrisitingarliga er Viðgerðarheimi Heilbrigdi í dag undir Heilsu- og Innlendismálaráðnum, og útreiðslurnar verða goldnar eftir eini rakstrarjáttan í Løgtingsins fíggjarlóg.

Rakstrarjáttanin fyri 2017 var kr. 5.960.000.

Tað vóru 9 heiltíðarstørv umframt 1 hálvtíðarstarv í Heilbrigdinum í 2017. Viðmerkjast skal, at vit høvdu nógvar sjúkradagar í 2016 og 2017. Samstundis skal serliga viðmerkjast, at í 2018 hava verið fleiri sjúkradagar enn nakrantíð. Væntandi verður hetta rættað upp frá 3. ársfjórðingi 2018 og frameftir. Hendan meirútreiðsla í 2018 kemur við vissu at ávirka játtanina.

**Árið 2017.**

Árið 2017 var í nógvum líkt árinum frammanundan, men við einari lítlari hækking av sjúklingum í viðgerð. Í 2016 vóru 84 innleggingar, og í 2017 vóru 85 innleggingar.

Í 2012 var á fyrsta sinni gjørdur ein mál og avrikssáttmáli millum Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Heilsumálaráðið.

Hesum gavst ein við í 2016.

Hetta var ein góður háttur til at seta felags mál eftir.

Bæði Heilbrigdi og Heilsu og Innlendismálaráðið vita fullvæl, at málini, visiónirnar, kunna røkkast enn betur um núverandi viðgerðarumstøður verða nýmótansgjørdar. Við komandi øktari játtan vil góðskan og úrslitini gerast enn betur.

Innanhýsis broytingar eru framdar fyri at betra um góðskuna í viðgerðini.

T.d. helt samarbeiðið við sálarfrøðing fram, ætlaða familjuviðgerðin er sett í gongd, og sjúklingar í eftirviðgerð luttaka tvær ferðir un vikuna í A.A fundum í Havnini. Hesi tiltøk fara at halda fram í 2018.

Tað verða innanhúsis bygnaðarbroytingar í 2018, soleiðis, at fastur viðgerðarleiðari (programleiðari) verður settur.

Somuleiðis verður í framtíðini stíla móti at hava fastar sjúkrarøktarfrøðingar, soleiðis at Heilbrigdi kann taka nýggjar sjúklingar inn allar 7 dagarnar í vikuni, mótvegis teimum 4 døgunum um vikuna í dag. Hetta verður mett sum eitt stórt framstig og kemur væntandi at kosta einar 300.000,- kr. árliga.

Ætlanin er at hava 10 evnisdagar í Sólarmagn, fyri fólk, ið hava verið í viðgerð.

Eitt hjartasuff.

Enn húsast viðgerðin í einum fyrrverandi sethúsum, ið eftir 31 ár, eru nógv slitin, hóast vanligt viðlíkahaldsarbeiði er gjørt alla tíðina. Nevnast skal, at húsini eru liðugt kløddd uttan, taki skift og øll vindeyguni skift. Hartil hava vit fingið eina eldávarðingarskipan.

Landsverk hevur í dag viðlíkahaldi av ognini hjá Heilbrigdi á Velbastað undir hond.

Sum nevnt, so fara Viðgerðarheimið Heilbrigdi saman við Heilsu og Innlendismálaráðnum vónandi at finna eina nýggja hóskandi loysn skjótast.

**Viðgerðartøl**

Í 2017 vóru 2.118 seingjardagar, deildir á 85 sjúklingar.

Viðgerðartíðin var í meðal 25 dag pr. sjúkling, og meðalaldurin var 49,3 ár. Meðalaldur á monnum var 48,4 ár, og hjá kvinnum 49,8 ár.

Tað hava verið níggju eftirviðgerðarskeið í 2017. Hetta hava verið dagskeið, og luttøkan hevur verið í miðal 37. Hetta er soleiðis 333 viðgerðardagar. Hartil so vóru 90 dagar í familjuviðgerð.

T.v.s. at í 2017 vóru 2.541, ímóti 2.802 í 2015, viðgerðardagar íalt Heilbrigdi.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir viðgerðardagar seinastu árini:




Í 2017 vóru 75 menn og 10 kvinnur í viðgerð.

Hjá monnunum vóru 60 við alkoholtrupuleikum og 15 við einum blandingsmissbrúki.

Hjá kvinnunum vóru 5 við alkoholtrupuleikum og 5 við einum blandingsmisbrúki.

Gongdin seinastu árini er lýst niðanfyri:







Ein broyting hevur verið hesi seinastu árini í viðgerðarhøpinum. Vit hava færri fólk í viðgerð, men viðgerðartíðin er vorðin longri. Hetta er javnað nakað aftur í 2017.

Gongdin í viðgerðartíð er lýst niðanfyri:




Annað er, at tey flestu, ið koma í viðgerð í dag, eru rúsfrí, tá tey koma í viðgerðina. Hetta ger, at nógv færri avrúsingardagar eru. Hetta vísir seg klárt aftur í úrslitinum.

Skommin av at fara í viðgerð er við at verða burtur. Fleiri fólk skilja í dag, at alkoholisma er ein sjúka.

Av teimum 85 sum vóru í viðgerð í 2017 vóru 38 fólk sum komu í viðgerð fyrstu ferð, meðan 47 fólk høvdu verið í viðgerð fyrr.

Býti millum 1. viðgerð og afturvendandi er lýst niðanfyri:




| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. viðgerð | 58 | 57 | 63 | 53 | 60 | 45 | 56 | 50 | 38 |
| 2. viðgerð | 33 | 29 | 28 | 38 | 21 | 26 | 22 | 23 | 28 |
| 3- viðgerð | 19 | 22 | 16 | 14 | 13 | 13 | 10 | 11 | 19 |

Av hesum persónum, ið hava verið í viðgerð meta vit at umleið 65 – 70% eru edrú í dag.

Síðan 01.12.1986 til 31.12.2017 hava verið 4.707 innleggingar, ið fevna um áleið 3.300 persónar.

Mett verður, at av hesum 3.300 eru umleið 640 deyðir, og okkara metan er so, at í dag eru gott 2.000 persónar rúsfríir, ið hava verið í viðgerð á Heilbrigdinum.

Vísandi til omanfyri, so er her talan um fólk í bestu árum, ið her hava fingið ein møguleika at gera nakað við sína lívshættisligu sjúku.

Hesi, og teirra nærmastu, eru vælvirkandi í okkara samfelagi í dag. Ja, ein kann spyrja seg sjálvan, hvussu hevði samfelagið klárað seg uttan hesi.? Tøkk til okkara politisku skipan, at hetta, hóast alt, ber til í dag.

Búskaparliga kann ein ikki siga annað enn, at her fær samfelagið sína fíggjarligu íløgu aftur fleirfalda.

Ætlanin er at sjónliggera Heilbrigdi væl meiri enn vit gera í dag. Hetta verður m.a. gjørt við nýggjari heimasíðu, har arbeiðið byrjar eftir summarsteðgin 2018.

Heilbrigdi og Bláikrossur hava rættuliga stóra kapping í dag. Fólk, ið eru bundin av rúsevnum kunna nú eisini privat søkja hjálp frá psykologum og terapeutum av ymiskum slag. Hesa tímaviðgerð gjalda tey sjálvi ella arbeiðsgevarin.

Loynidómurin um sjúkuna er tó enn væl goymdur, arbeiðsgevarin sleppur frá at gjalda sjúkraløn í viðgerðartíðini, varandi kostnaðarmikla eftirviðgerð, møguliga koma hesi í A.A, men fyrr ella seinni koma hesi so í eina almenna viðgerð.

Tá verða hesi als ikki so løtt at viðgera, tí tey eru von við at vera í viðgerð.

Lat tað verða sligið fast enn einaferð, at alkoholisma er ein kronisk, progresiv og deyðilig sjúka, og krevur tí tað bestu dokumentaraðu viðgerðina, ið tað Almenna hevur sett á stovn.

Vilja enn einaferð minna á, at viðgerðin í Viðgerðarheiminum Heilbrigdi viðgerð eftir teimum góðkendu viðtøkunum av sjúkuni hjá WHO – kotur F 10 ICD( International statistical Classification of Diseases and Healt Problems).

Vit eiga at minnast til, at Minnesota viðgerðin er tann mest nýtti viðgerðarháttur í Heiminum og tí eigur tað Almenna at ganga á odda við at stuðla undir júst hesa viðgerðina.

## Átekning frá nevnd og fyristøðumanni:

Nevndin og fyristøðumaðurin fyri Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnin Heilbrigdi hava í dag viðgjørt og endaliga viðtikið ársroknskapin fyri 2017.

Velbastaður, hin 20. juli 2018

**Fyristøðumaður:**

Sjúrður Knudsen

**Nevnd:**

Rasmus Patursson, fm.

Kári Thorsteinsson

Jákup Lindenskov

Michael Olsen

Jens Andreassen

# Váttan frá óheftum grannskoðara

## Til nevndina í Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovninum Heilbrigdi

### *Átekning á ársroknskapin*

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, síða 7-8, hjá Viðgerðarheimið Heilbrigdi og fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017, sum er gjørdur eftir galdandi roknskaparkunngerð.

Og vit hava grannskoðað ársroknskapin, síða 9, hjá Sjálvsognarstovninum Heilbrigdi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017, sum er gjørdur eftir galdandi roknskaparkunngerð.

### Ábyrgd leiðslunar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við galdandi roknskaparkunngerð. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til, fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av stovnana ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2017, og av úrslitinum av virksemi stovnana í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2017 samsvarandi galdandi roknskaparkunngerð.

Saltangará, hin 20. juli 2018.

**Grannskoðarastovan í Runavík Sp/f,**
góðkent grannskoðanarvirki

**Mark T. Højgaard**
Skrás. grannskoðari.

# Viðgerðarheimið Heilbrigdi

| RAKSTRARROKNSKAPUR | | Roknskapur | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| **Konto** | **Lønir** | **2016** | **2017** |
| 11.00 | Mánaðarlønt | 2.859.150,67 | 3.077.349,87 |
| 11.12 | Tímalønt | 723.279,63 | 541.401,61 |
| 11.40 | Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0,00 | 112.240,00 |
| 11.60 | Arbeiðsmarknaðargjøld | 160.851,00 | 164.281,00 |
| 11.70 | Eftirlønir | 428.425,45 | 361.561,95 |
| | **Lønir íalt** | **4.171.706,75** | **4.256.834,43** |

| Konto | Rakstur | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|
| 14.10 | Ferðing og flutningur, innanlands | 13.401,00 | 9.188,30 |
| 14.11 | Ferðing og flutningur, uttanlands | 13.972,00 | 26.362,00 |
| 14.12 | Ferðing og flutningur, onnur | 0,00 | 5.842,00 |
| 14.20 | Umboðan | 46.002,00 | 28.392,00 |
| 14.30 | Matur og drykkjuvørur | 327.334,50 | 314.739,31 |
| 14.41 | Orkukeyp - el | 35.056,16 | 38.726,46 |
| 14.42 | Orkukeyp til hiting | 20.896,96 | 25.372,19 |
| 14.43 | Orkukeyp, maskinur, flutningsútbúnaður o.a. | 9.347,00 | 2.016,52 |
| 14.60 | Keyp av pappíri og prentlutum | 37.032,20 | 1.432,00 |
| 14.69 | Keyp av vørum annars | 70.240,19 | 109.178,97 |
| 14.70 | Telefon | 25.022,77 | 25.671,21 |
| 14.71 | Postgjøld | 300,00 | 300,00 |
| 14.72 | Grannskoðan, Sakarkostnaður v.m | 32.000,00 | 27.000,00 |
| 14.73 | Trygging | 39.726,78 | 28.033,26 |
| 14.74 | Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningar | 13.331,14 | 26.726,83 |
| 14.79 | Keyp av tænastuveitingum annars | 659.091,97 | 502.633,44 |
| 15.20 | Telduútbúnaður og edv-menning | 10.651,90 | 5.990,00 |
| 15.30 | Skrivstovuútbúnaður | 1.973,56 | 6.580,00 |
| 15.40 | Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 68.098,06 | 31.056,00 |
| 16.10 | Húsaleiga | 26.500,00 | 24.000,00 |
| 16.51 | Umvæl- og viðlíkahaldsútr., bygningar | 72.838,59 | 56.388,92 |
| 16.53 | Umvæl.- og viðlíkahaldsútr. av flutningsútbúnaði | 0,00 | 2.588,50 |
| 16.90 | Skattir, avgjøld o.t. | 7.805,00 | 4.518,50 |
| 19.80 | Kassa-, kursmunir o.a. | 15,09 | 0,00 |
| 55.90 | Óvanligar flytingar annars | 162.000,00 | 162.000,00 |
| 57.90 | Aðrar rentuútreiðslur | 0,00 | -126,07 |
| 68.90 | Roknað renta annars | 72,23 | 0,00 |
| 75.10 | Keyps-mvg land | 212.824,09 | 196.177,80 |
| | **Rakstur íalt** | **1.905.533,19** | **1.660.788,14** |

| | | |
|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **6.077.239,94** | **5.917.622,57** |

# Viðgerðarheimið Heilbrigdi

| JÁTTAN OG MILLUMVERANDI | | Roknskapur | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| **Konto** | **Játtan** | **2016** | **2017** |
| | Rakstrarútreiðslur íalt | 6.077.239,94 | 5.917.622,57 |
| 75.99 | Herav mvg | -212.824,09 | -196.177,80 |
| | Rakstrarútreiðslur uttan mvg | 5.864.415,85 | 5.721.444,77 |
| | | | |
| | Játtan | -5.970.000,00 | -5.960.000,00 |
| | Munur | -105.584,15 | -238.555,23 |
| | | | |
| | Meirvirðisgjald sb.omanfyri | 212.824,09 | 196.177,80 |
| | Endurrindað | -212.824,09 | -196.177,80 |
| | Munur | 0,00 | 0,00 |
| | | | |
| | **Íalt** | **-105.584,15** | **-238.555,23** |

# Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi

| RAKSTRARROKNSKAPUR | | Roknskapur | Roknskapur |
|---|---|---|---|
| **Konto** | **Inntøkur** | **2016** | **2017** |
| 21.50 | Húsaleiga | -162.000,00 | -162.000,00 |
| 32.99 | Mótkonta til 32.91 | -131.877,00 | -131.877,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-293.877,00** | **-293.877,00** |
| **Konto** | **Útreiðslur** | | |
| 32.91 | Avskrivingar | 131.877,00 | 131.877,00 |
| 57.20 | Veðrentur | 72.281,18 | 66.082,37 |
| 83.32 | Innalandsskuld, vanlig lán - afturgjald | 89.718,82 | 95.917,63 |
| | **Útreiðslur íalt** | **293.877,00** | **293.877,00** |
| | **Ársins úrslit** | **0,00** | **0,00** |

| FÍGGJARSTØÐA | | 31.12.2016 | 31.12.2017 |
|---|---|---|---|
| **OGN** | | | |
| **Konto** | **Støðisogn** | | |
| 01.30 | Bygningur | 3.956.323,66 | 3.956.323,66 |
| 01.39 | Samantaldar avskrivingar | -791.262,00 | -923.139,00 |
| | **Støðisogn íalt** | **3.165.061,66** | **3.033.184,66** |
| | **OGN ÍALT** | **3.165.061,66** | **3.033.184,66** |
| **SKULD OG EGINOGN** | | | |
| **Konto** | **Skuld** | | |
| 07.30 | Eik Banki 248.444.9 | 1.122.770,07 | 1.026.852,44 |
| | **Skuld íalt** | **1.122.770,07** | **1.026.852,44** |
| **Konto** | **Eginogn** | | |
| 05.10 | Saldo | 2.084.449,77 | 2.042.291,59 |
| 05.32 | Mótkonto til matr. útbúnað (Stk 01) | -131.877,00 | -131.877,00 |
| | Avdráttir | 89.718,82 | 95.917,63 |
| | **Eginogn íalt** | **2.042.291,59** | **2.006.332,22** |
| | **SKULD OG EGINOGN ÍALT** | **3.165.061,66** | **3.033.184,66** |

**AÐRAR SKYLDUR**

Eik Banki hevur 1. veðrætt í matr. nr. 4B, Velbastaður áljóandi kr. 3.000.000.